

*Hetta er fimta árið, at sild er skorin umborð á Norðborg. Summi ár, eitt nú í ár og fyrraári, hevur hetta loyst seg væl, men onnur ár hevur minni lønsemi verið í framleiðsluni í mun til at landa sildina óvirkaða. Ein maður hevur staðið við hvørja av teimum seks skerimaskinunum, men til næstu vertíð, verður íleggingin meira sjálvvirkandi við einum "komputara" ella einum "kamera", sum syrgir fyri, at sildirnar liggja upp á pláss, tá ið tær fara í knívarnar í maskinunum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Prísirnir hava verið misjavnir seinastu árini. Í fjør var prísurin einki serligur, men árið fyri var hann eisini góður.

Hann vísir á, at Norðborg og Christian í Grótinum hava arbeitt saman um sildina.

- Skipini hava partrolað, og síðan er sildin skorin umborð á Norðborg. Ein partur av veiðini er førdur feskur til lands og er pakkaður á Kollafjord Pelagic.

Umborð á Norðborg verður sildin skorin í butterfly-fløk, sum eru fryst og pakkað í blokk.

Einir 28 mans eru umborð á Norðborg í sildatíðini, men her hevur reiðaríið skipað so fyri, at ein partur av manningini, sum hoyrir til Christian í Grótinum, hevur verið umborð á Norðborg.

- Maskinurnar umborð á Norðborg eru seks í tali. Hetta eru sonevndu VMK-maskinurnar, sum roynast væl. Maskinurnar eru av sama slagi, sum tær, ið eitt nú hava verið umborð á Nærabergi.

Kristian Martin sigur, at reiðaríið hjá skipunum nú hevur sett ein mann av taka sær av søluni, og hesin er Palli Ziskason, sum hevur verið í reiðarínum í fleiri ár.

- Vit samstarva framvegis við norska felagið, sum hevur tikið sær av søluni, men nú hava vit meira enn áður fingurin á "pulsinum" við søluni, sigur hann.

## Spara fólk

Hetta er fimta árið, at sild er skorin umborð á Norðborg, og soleiðis sum Kristian Martin málber seg, hevur hetta loyst seg væl summi ár, eitt nú í ár og fyrraári, men onnur ár hevur minni lønsemi verið í framleiðsluni í mun til at landa sildina óvirkaða.

Hann sigur, at ein maður hevur staðið við hvørja av teimum seks maskinunum umborð á Norðborg, men til næstu vertíð, verður íleggingin í maskinurnar gjørd meira sjálvvirkandi við einum "komputara" ella einum "kamera", sum syrgir fyri, at sildirnar liggja upp á pláss, tá ið tær fara í knívarnar í maskinunum.

- Tá ið vit fara aftur á sild, kemur bert ein maður at standa við tær seks maskinurnar, sigur reiðarin, Kristian Martin Rasmussen.

Skiparar á Christiani í Grótinum og Norðborg eru brøðurnir og synirnir hjá Kristian Martini, Jón og Bogi Rasmussen.

---

# ljón krónur í eina viku

svartkjafti at síggja, men ikki so mikið, at veiðan er lønandi við verandi ráfiskaprísi og verandi oljuprísi.

Kristian Martin sigur, at russisku skipini lógu um 50-80 tons um samdøgnið, og tað er ov lítið, um veiðan skal vera lønandi.

- Hetta skuldi annars verið góð tíð til svartkjaft, men sum út sær í løtuni, er ikki nógv at fara eftir. Veðrið hevur eisini verið rættiliga ólagaligt, og tí liggja bæði skipini hjá okkum í løtuni.

## Rossamakrelur

Reiðarin sigur, at teir ætla at gera eina roynd aftrat um stutta tíð, og hann vónar, at skipini tá fara at raka við svartkjaft, sum loysir seg at fiska.

Sum skilst á Kristian Martini, eru Finnur Fríði og Jupiter í løtuni í Norðsjónum, har teir royna eftir rossamakreli. Teir fiska av eini felagskvotu, sum er lítil.

- Eg vænti, at vit fara eitt rend í Norðsjógvin, har eitt sindur er at fiska í norskum- og bretskum sjógvi.

Á Kristian Martin Rasmussen skilst, at tað verður ikki tað nógva, sum fæst burtur úr rossamakrelinum nú, tí kvotan er so lítil.



*Á Havsbrún í Fuglafirði merkja tey, at eingin svartkjaftur kemur upp á land í løtuni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*